

**BOTNUPPGERÐ**

*Dysturin millum B71 og AB er dysturin um eitt pláss oman fyri ella niðan fyri niðurflytingarstrikuna*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Botnbrak á Sandi

**VODAFONEDEILDIN** B71 kann við heimasigri í botndystnum ímóti AB sleppa longur úr botninum, men eisini kann AB lyfta seg upp um niðurflytingarstrikuna

Hilmar Jan Hansen

Fyri fýra árum síðani fylgdust B71 og AB upp í bestu mansdeildina, men síðani hava bæði verið niðri í 1. deild aftur og vent, men eru eisini komin uppaftur. Júst niðurflytingarhóttanin er aftur í ár ein partur av gerandisdegnum hjá báðum feløgunum, ið sunnudagin klokkan 15 bresta saman í botnbraki á Sandi.

Undan dystinum liggur B71 betur fyri og kann við sigri koma at liggja uppaftur betur fyri. B71 er tvey stig framman fyri AB, sum saman við FC Suðuroy er undir strikuni, og við sigri fara sandoyingarnir fimm stig framum. Vinnur AB hinvegin, sleppa argjamenn upp um strikuna og kunnu kanska anda eitt sindur lættari.

– Hjá okkum eru allir klárir, tí her eru hvørki skaðar ella karantenur, umframt at vit nú aftur hava Predrag Markovic í málinum. Fyri okkum er hetta ein sera týðandi dystur, og vit fara at leggja nógv fyri, so vit kunnu fáa trý stig burturúr á heimavølli, sigur Piotr Krakowski, venjari hjá B71.

AB kemur ikki við fullari manning suður í Sandoynna, tí Nikolaj Eriksen er niðri, umframt at Morten Overgaard framvegis er skaddur og neyvan verður klárur aftur fyrr enn eftir summarsteðgin.

– Vit hava kortini góðar vónir, tí vit føla, at vit hava fingið glið á spælið aftur, soleiðis sum vit sóu tað í fjør. Eisini gongst betur at halda tætt har afturi, og vit hava fingið fýra stig burtur úr teimum báðum síðstu dystunum. Nú skulu vit bara ikki tapa hendan, sigur AB-venjarin, Allan Mørkøre.

Tá AB og B71 spældu á Argjum fyrst í apríl, endaði tað við einum málríkum javnleiki, 3-3, har B71 var á odda tríggjar ferðir, men kortini ikki megnaði at halda stand og mátti lata tvey stig frá sær.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Ein sigur nógv at siga




**AVGERANDI**

*Úrslitið á Toftum, tá B68 tekur ímóti B36 sunnudagin, kann vera rættiliga avgerandi fyri, hvussu kappingarárið víðari sær út hjá hesum báðum liðunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**VODAFONEDEILDIN** Hvørki B68 ella B36 kann sunnudagin fara á vøllin við síni sterkastu uppstilling í avgerandi dystinum teirra millum, tí bæði liðini hava í løtuni fleiri skaddar spælarar

Hilmar Jan Hansen

Serliga er tað hjá B68, at skaðarnir koma illa við, tí talan er um teir báðar markantu útlendingarnar, Keita og Ndende, ið ikki eru 100 prosent klárir og tí neyvan heldur koma at fáa nakran avgerandi leiklut í dystinum, sum verður bríkslaður í gongd á Svangaskarði sunnudagin klokkan 15. Haraftrat situr Oddur Højgaard, ið higartil hevur skotið fimm mál, uttanfyri við karantenu.

– Umframt hesar, eru fleiri smáskaðar, men tað ávirkar ikki málið hjá okkum, sum er at fáa trý stig burtur úr dystinum, tí vit hava bara fingið eitt stig burtur úr síðstu fimm dystunum, sigur B68-venjarin, Bill McLeod Jacobsen.

– At vit nú hava havt ein steðg upp á tvær vikur, hevur sjálvandi bøtt eitt sindur um støðuna, men annars hava vit nakrar ungar og svangar menn, sum heldur enn fegnir vilja sleppa inn at vísa, hvør dugur er í teimum.

> **Vinna vit, eru vit beinanvegin aftur í nánd av europeiskum plássi**
>
> SIGFRÍÐUR CLEMENTSEN, B36

Heldur ikki Sigfríður Clementsen sleppur sum B36-venjari undan at hugsa eitt sindur um teir spælarar, hann ikki fær brúkt. Bæði Símun Joensen og Meinhardt Joensen sita uttanfyri, og hóast Ingi Højsted aftur er farin at venja við fullari ferð, verður hann neyvan við á Toftum, har B36 skal royna at endurtaka sigurin frá fyrra dystinum millum liðini bæði í Havn. Tá vann B36 3-1.

– Hetta er ein dystur, sum er rættiliga avgerandi fyri báðar partar. Vinnur B68, so fáa toftamenn fatur í okkum, men vinna vit hinvegin, so eru vit beinanvegin aftur í nánd av einum plássi, ið kann geva europeiskan fótbólt komandi ár, sigur hann.

– Fyri okkum ræður um, at vit vísa, at dysturin týskvøldið, tá vit mistu finalussessin, ikki vísti okkum, soleiðis sum vit eiga at spæla. Nú skulu vit inn á vøllin at vísa, hvat vit veruliga eru verdir.

*hilmarjan@sosialurin.fo*